Bólkur 3:

# Ikki meira enn akkurát



*Leingi stóð heilt nógv á hjá havnarfeløgunum báðum, men í longdini samdust tey um javnleik, soleiðis at bæði koma víðari í steypakappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Gøtumenn sendu nervarnar hjá havnarfeløgunum í topp, tá sigurin á HB viðførdi, at annar av grannunum kundi rúka, men í seinasta enda kundi tað alt verða tað sama**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Tað varð alla tíðina sagt, at bólkur trý í steypakappingini var hin sterkasti. Við GÍ, HB og B36 í sama bólki, var leikluturin hjá Skála mettur at vera útspældur, longu áðrenn kappingin byrjaði, og tað var nú heldur ikki stórvegis, sum Skála fekk gjørt, til tess at forða hesi útsøgnini. Heldur ikki hóast teir í dystinum móti B36 í Havn vóru heilt nær javnleikinum.

Tað vórðu gøtumenn, sum endaðu ovast í bólkinum, og harvið vunnu sær rætt til heimavøll í fjórðingsfinaluni. Hetta tryggjaðu teir sær sum longu skírishósdag, tá teir rættiliga óvæntað vunnu 1-0 á HB í Gundadali. Ikki minst var hetta óvæntað, tí GÍ vikuskiftið undan hesum hevði fingið av at vita frá B36.

Og leingi var líkt til, at teir í HB ætlaðu sær at gera tað sama við GÍ. Gjøgnum stórt sæð allan dystin, og serliga í fyrra hálvleiki løgdu teir eitt støðugt trýst oman móti GÍ-málinum, men hóast leikliga yvirvág, so var tað so sum so við málmøguleikunum. Og fáa ferðirnar at boð vóru eftir GÍ-málverjanum, var hann ósvikaliga tryggur.

Móti dystarenda kom tó nakað av lívi í. Fyrst sendi Birgir Sondum Áslak Petersen av vøllinum, tá hesin fekk næsta gula kortið, og seinni komu eisini málmøguleikarnir. Tann største hevði HB ivaleyst, tá Páll M. Joensen varð spældur blankur mitt fyri. Snildisliga sendi hann bóltin væl út um armarnar hjá pólendinginum í GÍ-málinum, men bólturin brast á stólpan og aftur til málverjan. Og so kundi GÍ sláa aftur.

Beinan vegin eftir hetta eydnaðist nevnliga Jónreid Dalheim at skora eftir eitt fyrimyndarligt álop. Jónreid byrjaði hetta sjálvur, tá hann dróg framvið verjuleikara, og Krzystof Popczynski sýndi framúr hegni við bóltinum, tá hann setti bæði Jan Dam og Bárð Johannesen av, áðrenn hann legði út frá aftur til málskjúttan.

Um sama mundi ognaði B36 sær trý stig á Skála, tó at teir fingu ein lítlan skelk longu eftir fyrsta hálva minuttinum, tá Petur Svávarsson langaði bóltin í málið.

Tað var tó skjótt, at B36 kom seg, og við málum frá Jákup á Borg og Julian Johnsson undan steðginum, fingu teir tamarhald á støðuni. Leingi var tó bert hetta eina málið á muni, men tá Julian so slerdi sigurin fastan við enn einum máli, mundu tey flestu halda, at nú var leyst og liðugt.

Tað hevur nevnliga vanliga verið so, at níggju stig hava verið nóg mikið at koma víðari úr bólkaspælinum við, og tí mundu hvørki tey í HB ella B36 hugsa stórvegis um víðari luttøkuna, tá hósdagurin var runnin.

Men við gjøllari roknistykkjum gjørdist skjótt greitt, at hetta so langt ífrá var víst. Tí gjørdist tað allar helst soleiðis, at dysturin millum havnarfeløgini mánadagin skuldi verða eitt slag av útskiljing, har taparin mátti taka til takkar við farvæl og takk, og tað var so ikki nakað, sum vildi hóva nøkrum av feløgunum.

Óttin í feløgunum tóktist eisini hava flutt seg út til leikararnar á vøllinum, tá dysturin varð leiktur mánadagin. Fyrstu løtuna vóru tað serliga teir í árstalsfelagnum, sum vóru um ein háls, og var tað ikki fyri ein væl upplagdan Trónd Vatnhamar í málinum, kundi HB væl og virðiliga hava lagt seg á odda fyrsta hálva tíman. Men ístaðin varð tað B36, sum fekk fyrsta málið.

HB hevði longu fingið eina ávaring, tá John Petersen í púra fríari støðu sendi við síðuna av málinum, men løtu seinni var tað álvara. Bárður Johannesen framdi stórbjarging, tá innlegg úr vinstru varð stútað móti málinum, men hann fekk bara beint bóltin yvir til Jákup á Borg, sum tætt undir málinum fekk skumpað bóltin inn um liggjandi verjuleikara.

Ein løtu í seinna hálvleiki var HB ávegis úr steypakappingini, og grannarnir høvdu eisini møguleika at undirstrika hetta, tá John Petersen skammiliga misnýtti møguleika, eftir at Jákup á Borg hevði snýtt bæði Jan Dam og Bárð Johannesen. Og so kundi Andrew av Fløtum ístaðin senda B36-áskoðararnar á pínubeinkin, tá hann sera hegnisliga undir hørðum trýsti hálvfluktaði eitt langt innkast inn við nærmara stólpa.

HB hevði enntá møguleikan at senda B36 heilt í kjallaran, tá teir í seinastu minuttunum sendu á tvørtræið, men tá var úrslitið úr Vági longu greitt, har EB/Streymur í evstu løtu hevði javnað, og soleiðis sendi Svartaper til VB.

Hóast víðari luttøku hjá báðum havanrfeløgunum, so man tað tó kennast herskin biti, at hvørgin teirra fær heimavøll í fjórðingsfinaluni.

Tað fáa gøtumenn nevnliga, eftir at teir staðfestu oddasessin við tryggum heimasigri ímóti Skála. Longu í fyrra hálvleiki hevði leikandi venjarin hjá GÍ, Krzystof Popczynski, mest sum avgjørt dystin við tveimum málum, og tá so Agnar Højgaard nakað seinni var óheppin at gera sjálvmál, var eingin vegur aftur hjá Skála.

Iulian Florescu minkaði um munin í seinna hálvleiki við góðum langskoti, men tað munaði lítið í samlaða roknskapinum, og so kundi Bartal Eliasen sláa sigurin fastan.

Sum sagt, so staðfestu gøtumenn við sigrinum fyrsta plássið í bólkinum, og mett eftir mótstøðuni í bólkinum, so má hetta í øllum førum takast sum eitt tekin um, at gøtumenn aftur í ár eru eitt lið, sum roknast skal við, tá heiðursmerki og europeiskir sessir verða býtt út seinni í ár.

### Bólkur 3 í tølum

HB-GÍ 0-1 (0-0)
0-1: Jónreid Dalheim

**Skála-B36 1-3 (1-2)**
1-0: Petur Svávarsson
1-1: Jákup á Borg
1-2: Julian Johnsson
1-3: Julian Johnsson

**B36-HB 1-1 (1-0)**
1-0: Jákup á Borg
1-1: Andrew av Fløtum

**GÍ-Skála 4-1 (3-0)**
1-0: Krzystof Popczynski
2-0: Krzystof Popczynski
3-0: sjálvmál
3-1: Julian Florescu
4-1: Bartal Eliasen



# Høvuðsstaðurin hekk í kløllnum tráði

**Bæði B36 og HB vóru eina løtu 2. páskadag uttanfyri steypakappingina, men tey bjargaðu sær, meðan VB sat eftir við svarta peri**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Fyri tað mesta var tað EB/Streymur, sum rann aftaná VB, men í evstu løtu skoraðu gestirnir tvær ferðir, og so stóð VB eftir við ongum*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Søguliga er HB steypaliðið framum øll onnur í Føroyum. HB hevur vunnið steypakappingina 25 ferðir, síðani tað varð farið undir kappingina í 1955. Teir hava vunnið eitt Ísafjarðarbikar, tríggjar Ísafjarðarsúlur og eitt Løgmanssteyp til ognar.

Seinastu árini hava ikki verið góð hjá HB í steypakappinini. Síðani tað í 1999 varð farið undir kapping um nýtt Løgmanssteyp, hevur HB ongantíð vunnið, og teir hava hesi árini sett eitt met, sum teimum ikki líkar. Teir hava tapt tvær finalur á rað. Fyrst í 2000 og so aftur í fjør.

HB er framvegis partur av steypakappingini 2003. Men 2. páskadag var um reppið, at teir mistu plássið. B36 var góða løtu á odda 1–0 í grannauppgerðini. Samstundis var VB á odda bæði 1–0 og 2–0 á heimavølli ímóti EB/Streymi. Tá var HB ikki í fjórðingsfinaluni.

So javnaði HB í Gundadali. Tá stóð væl til hjá HB og illa til hjá B36, sum síðst vann Løgmanssteypið í 2001. Síðsta hálva tíman í dystinum 2. páskadag var B36 ikki í fjórðingsfinaluni. Men so var tað, at EB/Streymur javnaði til 2–2 í Vági. Harvið vóru bæði HB og B36 í fjórðingsfinaluni. Stóri taparin í tøttu kappingini gjørdist VB. Saman við AB, TB og Skála, sum langt síðani høvdu mist allar møguleikar at halda fram í kappingini, er VB ikki partur í fjórðingsfinaluni.

Lutakastið til fjórðingsfinaluna skuldi vera í gjárkvøldið. Frammanundan var greitt, at EB/Streymur, NSÍ, GÍ og B68 skuldu spæla á heimavølli. Toftamenn vóru illa fyri undan síðsta umfarinum í bólkaspælinum, og teir vóru verri fyri, tá ið NSÍ legði seg á odda 1–0. Men B68 mundi hava meiri at spæla fyri mánadagin, enn NSÍ hevði, og so vann B68 2–1. Harvið vóru teir partur av fjórðingsfinaluni og so góður partur, at teir eiga heimavøll.

Undan lutakastinum var greitt, at GÍ í fjórðingsfinaluni skal spæla á heimavølli ímóti KÍ ella FS Vágum. Gøtumenn vóru í bólkaumfari saman við havnarfeløgunum, og síðani í fjør hava ásetingarnar verið soleiðis, at feløg, sum hava spælt saman í bólkaumfarinum, ikki kunnu hittast í fjórðingsfinaluni.

Undan lutakastinum var eisini greitt, at KÍ kundi ikki spæla á Eiði, og at FS Vágar ikki kundi spæla í Runavík í fjórðingsfinaluni.

Fjórðingsfinaluumfarið verður spælt annan sunnudag, 4. mai. Hálvfinalurnar vera 11. mai og 18. mai. Fyrsta umfarið í landskappingini verður Dýra biðjudag, sum er fríggjadagin 16. mai. Tá verður spælt soleiðis: NSÍ–Skála, HB–FS Vágar, GÍ–KÍ, EB/Streymur–B68 og VB–B36.



*Tað stóð heilt nógv á hjá havnarfeløgunum, men í seinasta enda rukke tey kortini bæði víðari í steypakappingini*
*Mynd: álvur Haraldsen*

## Nú er útselt

**Fótbóltssambandið hevur longu selt tey 4.700 atgongumerkini, sum tey høvdu at ráða yvir, og er tað fyrstu ferð, at atgongumerki til landsdyst eru seld somikið skjótt í forsølu**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

5.950 áskoðarar fáa loyvi til at koma á Tórsvøll, tá fótbóltslandsliðið um knappar tveir mánaðir skal soyna seg ímóti varaheimsmeistarunum í Týsklandi. Og longu nú er greitt, at talan verður um fullsettan leikvøll.

Fyri stuttari tíð síðani byrjaði FSF forsøluna av atgongumerkjum til dystin, og eftirspurningurin hevur verið somikið stórur, at tað longu nú kann staðfestast, at alt er bílagt.

Av skrivstovuni verður sagt, at tey nú fara at senda brøv út til teirra, sum hava skrivað seg upp til atgongumerki, og so skulu hesi gjalda fyri atgongumerkini innan fyri eina hampuliga stutta tíð. 10. mei er settur sum dagurin, har alt skal vera goldið, og um atgongumerkini tá ikki eru goldin, verða tey seld øðrum, verður sagt.

Umframt tey 4.700 atgongumekini, sum FSF hevur selt, eru 725 atgongumerki latin týska fótbóltssambandinum, DFB, meðan restin so eru atgongumerkini til VIP'ararmar hjá FSF.